# RØÐA 08.02.2023 Í NÝGGJUSTOVU Í HOYDØLUM

Thorvald Poulsen vildi, at ung listafólk við hegni til útbúgving skuldu fáa stuðul. At knýta útbúgving at listaligum virksemi er ikki sjálvsagt í einum samfelag, har amatørisman hevur fylt nógv, havt stóran týdning og enn er ráðandi á fleiri økjum. Kortini síggja vit í t.d. Løgtingstíðindum longu í 1920'unum og 30'unum, at løgtingið – áðrenn vit fingu grunnar og annað slíkt – játtar ungum listafólkum serligan stuðul til útbúgving, t.d. Mikines, sum eftir umsókn og samskifti við løgtingsmenn fekk játtað nakrar hundrað krónur síðst í 1920'unum og seinni onnur við honum.

Amatørurin kann siga, "eg geri hetta til stuttleika, mest fyri at fáa tíðina at ganga, hetta ríkar mítt lív, eg fái tað betri" ella líknandi. Tá vit lata listafólki virðisløn í Føroyum, hoyra vit tí, at tey við hvørt svara, "oy jesus takk, eg gera hetta bara til stuttleika, meinti einki soleiðis", næstan sum var tað eitt óhapp ella í hvussu er alt ov nógv at lata teimum virðisløn, og vit sum lurta ella hyggja ella møguliga hava sitið í nevnd fáa varhugan av, at kanska virðislønin eisini er eitt sindur til stuttleika, mest sum eitt fittligt trivnaðartiltak av onkrum slag.

Yrkislistafólk hinvegin mugu á annan hátt legitimera sítt virksemi, síni avrik. Yrkislistfólk mugu – verða tey spurd – røkka út um tað persónliga og siga, hví list er neyðug og hevur virði í einum størri samanhangi.

Yrkislist - professionell list – siga vit ofta er list, sum fólk liva av, tað eru pengarnir, lønin fyri listaliga arbeiðið, sum ger av, um talan er um yrkislist ella ei. Tað er einfalt og funktionelt at halda seg til, men mest sum ov einfalt. Mítt starv hevur m.a. við sær, at eg fái fráboðanir um hátíðarhald, seminar ella ráðstevnur í sambandi rundar dagar í bókmentum serliga, so eg taki tvey dømi um hetta. Franz Kafka, sum fyllir runt í ár, føddur í 1883 – og tann kenda seinasta myndin av honum við starandi eygum, tikin í 1923, fyllir hundrað - arbeiddi í

einum tryggingarfelag og livdi av tí. Edith Södergran, sum doyði í 1923, og sum tað tí ivaleyst fara at verða nógv seminar um ár, hevði ógvuliga avmarkað samband við listalig umhvørvi og livdi ongantíð av sínum yrkingum (tað var sum hon einsamøll kollvelti yrking í Norðurlondum).

Nógv onnur listafólk liva ikki av sínari list - og ikki av so nógvum øðrum heldur – men eru yrkislistafólk, tí tey ikki skapa til stuttleika ella fyri at fáa tíðina at ganga, fáa frið í sálina, men tí tey av álvara velja listina sum yrki fyrst og fremst - og tað sæst aftur í handverkinum, sum eitt tilvit ella í strembanini og í teirra listaligu avrikum.

Svenski yrkjarin Johan Jönson sigur í einari samrøðu í svenska *Dagens Nyheter* nú farna leygardag, 4. februar:

"Mitt liv blir inte bättre av att jag skriver, jag blir inte mer harmonisk eller lyckligare, snarare tvärtom. Mina sår och idiosynkrasier ristas bara ännu djupare i hjärnan och köttet".

At skapa list, í hesum føri skriva yrkingar, er fyri tann, sum ger tað av álvara og sum eitt yrki, ikki terapi, ikki til stuttleika ella fyri at finna frið. Tað minnir um útsøgnina hjá okkara egna Janusi Djurhuus, sum segði, at hann yrkti *ímóti* sínum vilja.

Thorvald Poulsen, sum var á leið á aldur við Mikines, hoyrdi til fyrsta ættarliðið av føroyingum, sum hugsaði um list sum eitt yrki. Vit eru øll amatørar við hvørt ella kanska ein stóran part av tíðini, vit eru uppií, eru kanska við til at stoypa ein garð og sleppa í ball aftaná, sjálvt um vit ikki rættiliga duga at stoypa, vit gera mat til onnur at eta, hóast vit ikki eru kokkar, vit seyma, skriva yrkingar til onkran vit eru góð við o.s.fr., og tað er stuttligt at vera amatørur, men vit – og kanska serliga vit, sum á ymsan hátt varða av listini – mugu vita hvat er hvat.

Í nevndini fyri grunn Thorvalds Poulsen av Steinum siti eg sjálvur vegna rektaran á Fróðskaparsetri Føroya, Jacob Eli Olsen, formaður í Føroya Lærarafelag, og Marita Dalsgaard forkvinna í LISA. Ein innanhýsis nevnd í LISA letur okkum eitt tilmæli hvørt ár, og vit halda okkum til ásetingarnar í testamentinum hjá Thorvaldi um “ungt listafólk við hegni til útbúgving”, tá vit taka avgerð. Tað plagar at ganga væl, og tað fer tað eisini í ár.

Bergur Djurhuus Hansen, Fróðskaparsetur Føroya